**Kvæðatilfar - Nr: 13**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** Allir flokkar

**Uppgávuslag / heiti:** Frá oyra til oyra

**Vegleiðing:**

Endamálið við uppgávuni er at vísa á, hvussu ótrúligt tað er, at vit í Føroyum hava varveitt eina so ríka kvæðamentan uttan at hava havt nakað føroyskt skriftmál.

Næmingarnir kvøða nøkur ørindi av kvæðnum tey hava fyri. Síðani seta tey seg niður á gólvið í ein ring.

Lærarin biður nú ein næming koma út í gongina við sær. Her lærir hann næmingin enn eitt ørindi. Tá ið næmingurin dugir ørindi fer hann uppí aftur ringin.

Nú teskar hann ørindi til næmingin undir liðini. Hesin teskar síðani ørindi til tann næsta, og soleiðis ferðast ørindi munn av munni kring allan ringin. Síðsti næmingurin, sum fær ørindi fortalt, skal nú siga tað hart og týðuligt.

Er flokkurin lítil kann ørindi ferðast tveir umgangir. Oftani hendir tað, at orðini eru broytt.